# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*» Tað vísir seg, sum skal tað gerast spennandi hjá okkum«*
*Bent Djurhuus, StÍF*

# Martin vann grand-prix talvið



*Av teimum 51 telvarunum, sum tókuk lut í Grand Prix-kappingini, stóð Martin Poulsen ovastur, tá øll umførini – og umdystur – vóru telvd*

*Mynd: www.faroechess.com*

## Ratingvirðislønir

Umframt at fremsti telvarin í kappingin fær heitið, Grandp Prix meistari, verða eisini sonevndar rating-virðislønir lætnar. Hetta eru virðislønir til teir telvarar, sum hava staðið seg best í mun til rating-talið. Og tær virðislønirnar fullur hesa ferð soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1750-2000 | Haldur S. Johansen |
| 1500-1749 | Margar Berg |
| 1250-1499 | Herborg Hansen |
| 1001-1249 | Einar Gregersen & Vagnur Dam |
| 1000 | Rúni Tindskarð Jacobsen |

Endaliga støðan

| Nr | Telvari | Rating | stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Martin Poulsen | 2306 | 20,5 |
| 2 | Finnbjørn Vang | 2109 | 20,5 |
| 3 | Carl Eli N. Samuelsen | 2247 | 19,0 |
| 4 | Rani Nolsøe | 2041 | 19,0 |
| 5 | Haldur S. Johansen | 1962 | 17,5 |
| 6 | Margar Berg | 1559 | 11,5 |
| 7 | Hjalti Toftum Jógvansson | 1476 | 9,0 |
| 9 | Heiðrikkur Jacobsen | 1483 | 8,5 |
| 10 | Høgni Egilstofr Nielsen | 1250 | 8,5 |

**Fyri fyrstu ferð í fleiri ár varð skipað fyri Grand-Prix kapping. Eftir spennandi endaumfar, har umdystur skuldi til, stóð Martin Poulsen at enda sum vinnari**

TALV
*tíðindaskriv*

28 telvarar tóku lut, tá finalan í Grand-Prix varð telvd í hølunum hjá Havnar Telvingarfelag leygardagin.

Talan var um triða umfar, og undan hesum lá Carl Martin Nolsøe Samuelsen best fyri í kappingini, har Martin Poulsen, Rani Nolsøe og Finnbjørn Vang tó vóru í hølunum á honum.

### Trilvandi favorittar

Tað var tó í nógvar mátar so sum so við avrikunum hjá favorittunum. Allir høvdu teir ein rættiliga óstøðugan dag, har summir av oddafiskunum púra óvæntað taptu fyri telvarunum við væl lægri rating.

Avgerandi fyri endastøðuna varð tó, at Martin Poulsen megnaði at basa Carl Eli í teirra talvi, har báðir telvararnir vóru í tíðarneyð. Tað bar við sær, at Martin at enda skuldi hava javnleik móti Finnbjørn Vang, men hetta eydnaðist tó ikki. Finnbjørn vann talvið, og so gjørdist neyðugt við snartalvi til at avgera GP-heitið.

Her var Martin tann stinnari, og við tryggum 2-0 varð tað soleiðis hann, sum fekk heiðurin av at gerast Grand Prix vinnari í talvi 2006.

# Giggs kann taka metið

**Sir Alex Ferguson heldur ikki, at nakað er til hindurs fyri, at Ryan Giggs kann seta met sum tann spælarin, ið hevur spælt flestar dystir fyri Manchester United**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá grannauppgerð var í Manchester leygardagin, fór walisiski Ryan Giggs um ein ein marknastein á fótbóltsleið síni. Talan var nevnliga um dyst nummar 688 hjá Giggs fyri reyðu devlarnar, og tað er tað næst mesta, sum nakar spælari hevur spælt á Old Trafford. Sama tal rakk Bill Foulkes, og nú er tað bara Sir Bobby Charlton, sum stendur ovarligari á listanum. Charlton spældi 759 ferðir fyri Manchester United.

Men stendur tað til venjara felagsins seinastu 20 árini, Sir Alex Ferguson, so fer Giggs eisini at taka hetta metið.

- Tað er avgjørt ein veruligur møguleiki fyri, at Ryan eisini fer at taka metið hjá Charlton. Kanska noyðist hann at broyta spælið nakað, soleiðis at hann fer longur inn á vøllin at spæla. Seinastu 15 árini hevur hann runnið oman og niðan eftir síðulinjuni, og bara tað er í sjálvum sær ótrúligt. Eg haldi so ikki, at eg havi sæð nakran spælara, sum støðugt hevur nýtt so nógva oku í Premier League, sigur Ferguson.

Og enn tykist eingin vandi fyri, at kviki walisin skal missa sítt pláss á liðnum.

- Hann hevur jú framvegis evnini at hava avgerandi ávirkan á dystirnar. Sum so nógvir spælarar av sínumk slag, so kann hann ikki renna og dribla alla tíðina. Men tá hann er í rætta lagnum, er Ryan knúsandi fyri mótstøðuna.




*Ryan Giggs í eyðkenda stílinum í sínum dysti nummar 688 fyri Manchester United*